# Persónlig
# OgnarRøkt

BANKNORDIK

**Persónlig OgnarRøkt**

Við Persónligari OgnarRøkt kann BankNordik bjóða eina dygdargóða tænastu, ið støðugt røktar tína samansparing. Tú fært fyrimunin av at hava tína egnu persónligu goymslu, samstundis við at serfrøðingar úr bankanum røkta tíni virðisbrøv.

Royndir vísa, at íløgur í eina samanseting av partabrøvum og lánsbrøvum í longdini geva størst avkast samanborið við at hava peningin standandi í bankanum. Við Persónligari OgnarRøkt frá BankNordik fært tú fyrimunirnar av at seta tína samansparing í virðisbrøv, uttan at tær nýtist at fylgja við á virðisbrævamarknaðinum. Serfrøðingarnir í bankanum syrgja fyri at gera íløgurnar við støði í tínum persónliga íløguprofili. Og tú hevur altíð yvirlit yvir júst hvørji virðisbrøv tú eigur. Ella sagt á ein annan hátt: Við Persónligari OgnarRøkt verður dentur lagdur á tryggleika og á tað einstaka.

Persónlig OgnarRøkt er ein annar valmøguleiki í staðin fyri íløgur í virðisbrøv, har tú sjálvur hevur ábyrgdina fyri keypi, sølu, umleggingum og teimum støðugu enduríløgunum. Við Persónligari OngarRøkt letur tú íløguserfrøðingarnar í bankanum um alt hetta.

**Soleiðis virkar Persónlig OgnarRøkt**

Persónlig OgnarRøkt er ætlað til tann partin av tíni samansparing, sum hevur ein tíðarkarm á trý ár ella meira. Saman við tær finna vit tín íløguprofil, sum tekur støði í tínum váðafýsni og tínum ynski um tíðarkarm, og við støði í íløguprofilinum verður tín samansparing sett í virðisbrøv. Vit hava gjørt eitt uppskot um íløguætlan í talvuni niðanfyri.

| Váðamynd | Miðal váði | Høgur váði |
| --- | --- | --- |
| Íløguupphædd:<br>50.000 – 300.000 kr. | 40 - 60 % lánsbrøv<br>20 - 40 % donsk partabrøv<br>10 - 30 % útlendsk partabrøv | 10 - 30 % lánsbrøv<br>30 - 50 % donsk partabrøv<br>30 - 50 % útlendsk partabrøv |
| Íløguupphædd:<br>Yvir 300.000 kr. | 40 - 60 % lánsbrøv<br>20 - 40 % donsk partabrøv<br>10 - 30 % útlendsk partabrøv | 10 - 30 % lánsbrøv<br>30 - 50 % donsk partabrøv<br>30 - 50 % útlendsk partabrøv |

BankNordik

Telefon 330 330
Telefaks 316 950

ilogur@banknordik.fo
www.banknordik.fo

**Persónlig OgnarRøkt í royndum**

BankNordik fær fulltrú til at røkta íløgurnar innanfyri karmarnar í avtaluni, so at vit kunnu seta tínar ognir júst har, sum bankin metir, at tað loysir seg best í mun til tín íløguprofil. Serfrøðingarnir í bankanum hava støðugt eftirlit við tínum íløgum.

Tá vit handla, senda vit tær altíð eina handilsnotu, og um tú til dømis ynskir at vita, hvørjar hugsanir eru handan umleggingar í tíni goymslu, kanst tú altíð spyrja á tíni deild ella lesa um umleggingarnar á banknordik.fo. Sjálvt um umsitingin av tíni samansparing er løgd í hendurnar hjá BankNordik, kanst tú framhaldandi fylgja við í gongdini. Hetta gevur tær tryggleika og gjøgnumskygni.

Um tú nýtir Netbanka frá BankNordik, hevur tú møguleika fyri at hava yvirlit yvir, hvussu virðisbrøvini í tíni goymslu hava klárað seg.

Tú kanst til eina og hvørja tíð siga tína Persónligu OgnarRøktar-avtalu upp við skriftligari freist á átta dagar.

**Váðamerking frá Fíggjareftirlitinum**

Fíggjareftirlitið hevur ásett reglur um váðamerking av íløgum, har íløgurnar verða býttar upp í grønar, gular og reyðar bólkar. Fyri meira kunning um váðamerking verður víst til heimasíðu bankans.

**Avkastsfrágreiðing**

Við Persónligari OgnarRøkt fært tú hálvárligar avkastsfrágreiðingar, sum lætt og greitt geva tær yvirlit yvir, hvat avkast tínar íløgur hava givið.

**Tað kostar Persónlig OgnarRøkt**

Upplýsingar um prísir og gjald fyri Persónliga OgnarRøkt eru at finna á heimasíðuni hjá BankNordik ella kunnu fáast í bankanum.

**Hvør kann nýta Persónliga OgnarRøkt?**

Allir kundar í BankNordik við yvir 50.000 krónum í tøkum peningi kunnu stovna eina Persónliga OgnarRøkt-avtalu. Tú skalt bert seta teg í samband við eina av deildum bankans.

Tænastan vendir sær til perónar við miðal ella høgum váðafýsni.

**Skatting**

Persónlig OgnarRøkt tekur ikki hædd fyri skatti, tá íløgur verða gjørdar. BankNordik mælir tær til at søkja vegleiðing hjá TAKS ella grannskoðara.

**Alment um íløgur**

At gera íløgur er altíð knýtt at einum ávísum váða fyri, at væntanirnar til framtíðar gongdina ikki vísa seg at halda. Íløgur í virðisbrøv kunnu føra til eitt tap treytað av kursbroytingunum, og íleggjari hevur sjávur ábyrgdina fyri hesum váða.